


## Meinhardt aftur til B36

Sum Sosialurin visti at siga herfyri, fer Meinhardt Joensen, sum síðsta kappingarár vardi málið hjá NSÍ, nú aftur til B36, har hann var málverji í 2008. Partarnir hava skrivað undir ein tvey ára sáttmála. – Eg eri sera fegin um, at Meinhardt hevur avgjørt at koma aftur til B36, tí hann er ein sera sterkur málverji, sum eisini er inni í landsliðshitanum. Tá Jóan Pauli Jakobsen, sum vardi málið hjá B36 seinasta kappingarár, so eisini boðaði felagnum frá, at hann fer niður at lesa eftir summarfrítíðina, gjørdist alneyðugt við einum nýggjum málverja, og hendan loysnin er heilt góð, sigur Kristian á Neystabø, formaður í B36, við heimasíðuna hjá felagnum.

### KÍF-Kyndil 29-18 (12-9):

# Kollfirðingar í finalustríðið

**Enn er KÍF niðast, men við sigrinum á Kyndli meldaðu kollfirðingar seg av álvara í dystin um at fylgja við Neistanum í FM-finaluna**




Jákup Mørk

HondbóltsFøroyar hava neyvan nakran tíð áður sæð eina somikið javna hondbóltskapping.

Gaman í er Neistin so ruddiliga á finalukós, men tað er í løtuni púrasta vónleyst at siga, hvat mótstøðuliðið verður í finaluni.

Kollfirðingar hava størsta partin av árinum verið á aftasta plássinum í landskappingini, og tað eru teir framvegis. Men eftir sigurin á Kyndli er munurin bert eitt stig upp til finaluplássið. Og verður avrikið hvørja ferð líka sannførandi, sum tað var hesaferð, kann tað stigið skjótt vera vunnið.

### Eingin ivi

Kollfirðingar vunnu nevnliga sín greiðasta sigur á árinum, tá teir snøgt sagt vundu burtur úr Kyndli, ið mest sum framvegis hevði jólafrí, tá dysturin í Kollafirði varð blástur ígongd.

Í øllum førum leyp KÍF avstað sum eitt óløgi, og tað skuldi eitt time-out til eftir longu níggju minuttum, áðrenn Kyndil vaknaði.

Eftir hetta fekk Kyndil minkað munin niður í trý mál, men alt hetta varð gjørt til einkis, tá farið varð út til seinna hálvleik. Tá endurtók sama søgan seg, og hóast Kyndils-venjarin aftur hesa ferð royndi seg við einum time-out, so fekk hetta als ikki ætlaðu effektina, tá Bárður Johannesen beint eftir hetta fekk reytt kort.

Uttan stríðsmannin hevði Kyndil sera ilt við at fóta sær móti altíð stríðshugaðu kollfirðingunum, og so kundi KÍF so ruddiliga staðfesta sigurin, sum vakti stóran fagna í høllini.

Enn sum áður er KÍF í niðurflytingarvanda, men tann vandin er ikki størri, enn hann er hjá hinum fýra, sum berjast um finaluplássið. Og júst dysturin um finaluplássið man vera nakað væl meira hugaligur at hugsa um hjá kollfirðingum, sum skulu leita aftur til fyrrapartin av 90'unum, um teir skulu finna sítt seinasta finalupláss.




**Fakta um dystin**

**KÍF-Kyndil 29-18 (12-9)**
**10 min:** 6-1
**20 min:** 9-6
**40 min:** 19-10
**50 min:** 26-14
**Málskjúttar**
**KÍF:** Andrias Nielsen 8, Ási Dam 8(3), Gert Hansen 5, Niklas Reginsson 2, Ingi Johannesen 2, Teitur Joensen 2, Rógvi Weyhe 1, Tony Weyhe 1
**Kyndil:** Bárður Johannesen 4, Ken Zachariassen 3(1), Hans Áki Dal-Christiansen 3(1), Josef Abrahamsen 3, Janus Einar Sørensen 2, Julian Johansen 1, Høgni Klein 1, Rani Ellingsgaard 1
**Brotskøst:** KÍF 5, Kyndil 4
**Útvísingar:** KÍF 5, Kyndil 2
**Diskvalifikatión:** Kyndil 1 (beinleiðis reytt)